# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nógv miðlavirksemi í Vágsbotni

Blaðið tygum sita í hondini við er eitt av teimum seinastu í hesum árinum. Eftir hetta kemur Sosialurin út við trimum útgávum aftrat og eru tvær teirra veruligir tungvektarar. Í blaðnum tollaksmessudag er sera rúgvusmikið jólablað. Tað hevur verið vanligur siður nú í mong mong ár, at øll blaðfólkini undir kønari hond hava fingið litið upp í hendi at gera eina serstaka søgu til ársins jólablað. Og úrslitið er gott kunnu vit siga. Í jólablaðnum er lesitilfar til øll jólini og nýggjárið við. Her er sera fjølbroyttur og forkunnugur lesnaðar, sum vit sjálvandi vóna, at okkara lesarar taka væl ímóti. Men eisini um nýggjársleitið gera vit meira burtur úr, tá vit í ársins seinasta blað fara at líta aftur um bak men eisini gloppa hurðina til nýggja árið.

Eisini hinir miðlarnir, sum Miðlahúsið umsitur, Rás2 og Portalarnir, fara at vera virknir restina av árinum, eisini tá einki blað kemur á gøtuna. Rás2 hevur longu verið í jólahýri í eina tíð og jólaradio á rásini fer at halda fram.

Men tað eru so eisini tíðir í árinum, har blað og rás hvíla. Ta tíðina er tó Føroya mest vitjaði portalur, Portalur. fo alvakin. Hendingar, burturi sum heima, verða at síggja á PORTALINUM nærum alt samdøgrið. Fólk við tilknýti til Miðlahúsið eru á vakt og fylgja við, um okkurt serligt er á vási. Og brúkararnir eru vælkomnir at senda tíðindi og myndir frá onkrari serstakari hending.

Og sum undanfarnu ár fara vit eisini at geva ÚTISETUM møguleikan at senda jóla- og nýggjársheilsan, sum verður at síggja á PORTALINUM. Høvið er tá eisini at senda eina mynd við, sum so saman við heilsanini fær innivist á Portalinum í jólavikuni. Treytirnar fyri at vera við er at orða seg stutt og greitt. Heilsanin skal sendast til jol@sosialurin.fo

**Sosialurin**

## Mótmæla at verða offur fyri skeivari stýring í kringvarpinum

*Tíðindaskriv*

Tað liggur stór ábyrgd á stjóranum í kringvarpinum at syrgja fyri, at stovnurin ikki disponerar ójáttaðan pening. Kortini hevur stjórin sett hópin av størvum í ár í teirri vón, at landsstýri og løgting fóru at játta pening. Tá peningurin ikki kom, offraði leiðslan royndastu starvsfólkini á stovninum. Vit sjey limir í Starvsmannafelagnum, sum hava fingið hoyringsskriv frá stjóranun, mótmæla allari framferðini í málinum

Okkara fatan er, at leiðslan í Kringvarpi Føroya hevur rættað bakara fyri smið, tá hon týsdagin 16. desember 2008 boðsendi átta starvsfólkum og handaði ætlanarskriv um uppsøgn.

Vit sjey, sum eru limir í Starvsmannafelagnum, hava tænt útvarpinum og/ella sjónvarpinum í mong ár – summi upp í 40 ár.

Grundarlagið fyri hesi hópuppsøgn sigst vera sparingar, og tá mugu tiltøk setast í verk, so raksturin fæst at hanga saman.

Hetta skilja vit, men vit skilja ikki, hví júst hesi átta fólkini skuldu avrættast í hesum meldrinum.

Tíðliga í heyst legði Kringvarpið eina rakstrarætlan, sum bygdi á, at stovnurin væntaði hægri inntøkur umvegis hægri kringvarpsgjald. Hesum noktaði landsstýrið fyri, og tí má nýggj rakstrarætlan leggjast fyri at fáa javnvág í raksturin.

Tað liggur stór ábyrgd á leiðslu og stýri at syrgja fyri, at raksturin hongur saman. Tað er eisini teirra ábyrgd at syrgja fyri, at stovnurin ikki disponerar pening, sum ikki er játtaður. Kortini hevur leiðslan sett hópin av størvum síðani september 2008 í teirri vón, at landsstýrið/løgtingið fór at játta pening.

Nevnast kann, at í allarseinastuni er sett nýtt starv sum lýsingasamskipari, eitt starv sum HR-fólk, fýra teknikaralærlingar aftrat fýra, sum vórðu settir fyrr í ár, og lýst verður eftir journalisti at seta 1. februar 2009. Hóast budgetterað varð við halli í 2008, eru nógv onnur størv sett, t.d. programfólk av ymsum slag og ikki minst leiðarar.

### Ósakligt grundarlag

Stýrið og leiðsla eiga nú at ásanna, at her varð farið ov skjótt fram, og eiga at seta sær fyri at finna ein leist fyri sparingunum, sum bæði er gjøgnumskygdur og rættvísur mótvegis starvsfólkunum og vísir virðing fyri landsins starvsfólkapolitikki.

Tað hevði verið natúrligt, um stovnurin vardi arbeiðsplássini hjá teimum, sum hava tænt stovninum leingi og hava førleikar til at útinna sítt verk, og fyrst umhugsaði størvini, sum sett eru seinast uttan fíggjarligan dekning.

Vit hava merkt okkum, at starvsfólkini, sum hava fingið ætlanarskriv um uppsøgn, so at siga øll eru úr tí eldra endanum av starvsfólkaliðnum og eru millum teirra, sum hava verið longst á stovninum hvørt á sínum øki.

Tað vil siga, at við einum pennastroki verður sagt farvæl við nógvar og drúgvar royndir og ikki minst vitan, sum er so umráðandi hjá slíkum mentanarstovni.

Hetta er ikki sakligt grundarlag og stendur í stórari andsøgn til eitt nú eldrapolitikkin hjá Føroya Landsstýri.

Tað sker í eyguni, at tríggir mans við drúgvum tekniskum royndum og førleikum eru uppsagdir, meðan stovnurin fyri stuttari tíð síðani hevur tikið upp á seg fíggjarligar skyldur við at seta átta lærlingar á sama øki.

Tað undrar stórliga, at tveir av royndastu programmedarbeiðurunum í útvarpinum verða sendir til hús, meðan stovnurin samstundis søkir alment eftir journalistiskari arbeiðsmegi.

Tveir medarbeiðarar á søvnum stovnsins verða eisini koyrdir til hús. Tey hava drúgvar royndir í hesum arbeiði og sita inni við ómissandi vitan.

Ein stórur og týðandi mentanarskattur liggur á søvnunum í Sortudíki og Vørðsluni. Við at koyra helvtina av savnsmanningini til hús er hesin skattur komin í alstóran vanda, og vitanin um søvnini er skerd óforsvarliga nógv í einum høggi.

Vit skilja, at stovnurin yvirhøvur ikki hevur roynt aðrar leiðir, so sum at bjóða fólki niðursetta arbeiðstíð, farloyvi uttan løn ella aðrar skipanir, so medarbeiðarar kundu varðveitt síni størv heilt ella partvíst.

### Endurskoða viðgerðina

Samanumtikið er líkt til, at kringvarpsleiðslan hevur skotið í flokkin uttan sakligar grundgevingar, og vit spyrja, um ætlaðu uppsagnirnar eru merktar av ávísum sikti.

Tað er ikki rímiligt, at vit, sum hava tænt stovninum loyalt væl og leingi, skulu bøta fyri fíggjarligu og rakstrarligu mistøkini, sum leiðslan á Kringvarpi Føroya hevur staðið fyri hetta seinasta árið.

Tí mótmæla vit uppsagnartilgongdini og krevja, at stýrið í kringvarpinum endurskoðar alla viðgerðina við støði í einum gjøgnumskygdum og virðiligum leisti mótvegis starvsfólkunum og virðing fyri landsins starvsfólkapolitikki.

Vit hava sýnt virðing fyri teirri uppgávu, sum kringvarpið skal røkja, og vóna at stýrið sýnir okkum somu virðing.

**Tórshavn 21/12-2008**

**Ragnar C. Joensen**
**Jógvan Arge**
**Ove Olsen**
**Benn Baldvinsson**
**Elsa Thomsen**
**Mikkjal Øster**
**Hjalmar Hvítklett**

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.